Uttan úr heimi

v/ Hans Holm

Friðarætlan fyri Bosnia-Hercegovina

Stutt herfyri settu triggir menn sína undirskrift undir eitt skjal, har skrivað stóð, at nú skuldi friður aftur valda í Bosnia-Hercegovina. Hesir menn vóru Slobodan Milosevic, forseti í Serbia-Montenegro (sum hann vil sleppa at kalla Juboslavia í framtíðini), Franjo Tudjmann, forseti í Kroatia, og Alia Izetbegovic, forseti í Bosnia-Hercegovina. Í hesum teknisk framkomnu tíðum kundi meginparturin av Heimsins íbúgvum fylgja hesi hátíðarløtu í Dayton, Ohio, U.S.A. beinleiðis í sjónvarpinum. Hvi vóru tað akkurát hesir triggir menninir, sum skrivaðu undir hetta skjalið?

Hyggja vit at kortinum, siggja vit, at gamla Jugoslavia – á tíð Tito's – umframt nevndu lond eisini umfatað Slovenia og Makedonia – og at í Serbia lógu tveir landspartar við heimastýri, Kosova og Vojvodina. Meðan lítið og onki av teimum uppruna fólkasløgum, ið yvirhøvur hoyra heima í Slovenia, Makedonia, Kosova og Vojvodina eru at finna í Bosnia-Hercegovina, so er umleið tríðingurin av fólkinum har serbar og næstan fjórðingur in kroatar. Bert teir, vit kenna undir navninum muslimar (teir vilja sjálvir helst kallast bosniakkar), eru fleiri, næstan 40%.

Hesi trý fólkasløgini eru við øðrum orðum tilsamans yvir 90% av øllum fólkinum í Bosnia-Hercegovina, men meira enn helvtin av teimum ho yrir tjóðskaparliga saman við einum grannalandi.

Tí vóru Milosevic sum serbaumboð og Tudjmann sum kroatumboð blandaðir uppi. Izetbegovic var sjálvandi við sum forseti í Bosnia-Hercegovina og umboð fyri muslimarnar.

Ongin teirra sá serliga glaður ella lukkuligur út, tá ið teir skrivaðu undir.

Hetta hongur óivað saman við tí, at Milosevic sum politiskt mál hevur eitt Stór-Serbia, har allir serbar skulu búgva, og Tudjmann eitt Stór-Kroatia við øllum Heimsins kroatum, og at Izetbegovic veit av hesum og við vissu kann rokna við, at Milosevic og Tudjmann helst vilja býta Bosnia-Hercegovina millum sín.

Tí var tað ikki við gleði ella av frium vilja, at hesir triggir menn skrivaðu undir, men vegna politiskt – og ikki minst – búskaparligt trýst frá heimssamfelagnum – og tá serliga U.S.A.


Friðarætlanin býtir nú landið sundur í ein serbiskt stýrdan part og ein kroatiskt-muslimskt stýrdan. Hesir partarnir skulu hvør sær hava eitt vittfevnandi sjálvstýri og so eitt felags ting, og felags forseta og stjórn í Sarajevo.

Fyri búðu tey ymsu fólkasløgini í Bosnia-Hercegovina í stóran mun fløkt inn imillum hvørt annað. Hetta hevði við sær, at nógv flýddu ella vórðu koyrd frá sínum heimstaði (etnisk útreinsan), tá ið bardagarnir byrjaðu. Tann fyrsta stóra uppgávan, komandi stjórnin fær, verður at fáa øll hesi fólkini heimaftur. Hetta verður ikki lætt, tí nógv er oyðilagt, og nógv fólk ræðast snøgt sagt fyri at koma aftur, tí hatrið er vorðið so ómetaliga stórt.

Og Vesturheimurin hevur eisini eina stóra uppgávu fyri framman: Hjálp má veitast ítøkiliga, ikki bert í orðum, fyrst og fremst av menniskjaligum orsøkum, men eisini tí tað vil loysa seg í longdini fyri Vesturheimin sjálvan.

Og ikki er bert hjálp neyðug, men stór hjálp, tí mett verður, at 30 til 40 milliardir krónur skulu til fyri at fáa landið í gongd aftur.






Av misgáum hava vit sett eina skeiva krossorðagátu í leygardagsblaðið. Vit biðja rithøvunda og lesarar halda okkum til góðar. Í dag er so rætta gátan í saman við vinnara frá seinast.

KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: LANDASTROK



Vinnari: Heidi Gullaksen, 410 Kollafirði

Hvønn leygardag

verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið »Krossorðagáta« á bjálvan.

Loysnunarorðið:

Navn

Bústaður

Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR